# Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya umsitur felagsuppgávur fyri Fíggjarmálaráðið og stovnar undir ráðnum. Hesir stovnar umfatar sjálvt ráðið eru: Føroya Gjaldstova, Lønardeildin, og Hagstova Føroya.

Samanlagt eru umleið 225 starvsfólk knýtt at móttøkuni.

www.tollskatt.fo

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo

## Móttøkan í Fíggjarmálaráðnum søkir eftir avloysara

**Hevur tú tænastulyndi og er altíð tilreiðar at veita eina hjálpandi hond, so er tað tær vit leita eftir!**

**Vit eru** ein stovnur í støðugari menning og virða meiningar og fjølbroytni hvør hjá øðrum. Virðini og mentanin eru m. a. grundarlagið undir virkseminum á stovninum.

**Høvuðsuppgávurnar í móttøkuni eru, at:**
- svara telefonunum hjá Fíggjarmálaráðnum, Gjaldstovuni, Hagstovuni, Lønardeildini og Toll- og Skattstovu Føroya
- taka ímóti viðskiftafólki, sum koma í Fíggjarmálaráðið
- vera við til at mynda okkara kundatænastu og orða ein telefonpolitikk
- loysa aðrar fyrifallandi uppgávur fyri stovnarnar í Fíggjarmálaráðnum.

**Vit ímynda okkum,** at tú ert fyrikomandi og beinasamur/som og gert títt besta fyri at menna eitt opið og nærverandi samskifti. Eisini vænta vit, at tú ert opin fyri nýggjum avbjóðingum, hevur góðan málburð á føroyskum, donskum og enskum, og er tað ein fyrimunur, um tú hevur royndir frá líknandi starvi.

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Meira um starvið**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Birgit Hansen 352690 ella til Hjørdis Gaard, fyrisitingarstjóra á telefon 352620.

**Send umsóknina** soleiðis, at vit hava hana í hendi **10. sept. 2007 kl. 16** og merk brævbjálvan "Umsókn" til:

**Toll- og Skattstovu Føroya**
Postrúm 2151
FO 165 Argir

*»VIT VÍSA VÆLVILD OG LURTA, TÁ VIÐSKIFTAFÓLK TØRVA HJÁLP«*




Lýsið
við
brúktum
bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo



# Bilur til sølu

ABS bremsur, airbag (4 stk.), aircondition, alarmur, alu-felgur, el-innstilling av forlyktum, el-spegl v/ varma, elrútar framman og aftan, fartpilot, fløgu-spælari, hiti í setrum framman, hjólspinsreguler-ing, innstilling av ratti, power-stýring, sleipikrók, sóltak, tónaðir rútar, tráðleyst centrallás.

Tað er ein Passat Limousine Comfortline. Sera væl hildin og nýliga útskjift kobling, kammreim og teir flestu slitdeilirnar so sum bremsuskivur, bøs-ningar, svingarm og annað, so bilurin er í sera góðum standi.

**Tlf. 573940**

## Arbeiðshandskar
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820



# Elektromekanikari til Pf. Eyðun Jespersen

Søkt verður eftir elektromekanikarum, at byrja skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um nýgerð og umvæling av elektromekaniskum skipanum, so sum generator-anleggum, pumpum, elmotorum, elstýringum, køliútgerð v.m.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum at tú hevur útbúgving sum elektromekanikari, maskinmeistari, elektrikari ella líknandi. Royndir innan hetta økið er avgjørt ein fyrimunur. Vit leggja dent á góð samstarvsevni, og at tú ert arbeiðssamur og megnar at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit bjóða**
tær eitt fjølbroytt og áhugavert arbeiði. Pf. Eyðun Jespersen hevur umleið 10 fólk í starvi sum er, og kemur tú at taka tær av alskyns uppgávum og fær harvið gott innlit í nógv viðurskifti.

Virksemið hjá Pf. Eyðun Jespersen er fjølbroytt innan handil, handverk og ídnað. Tað umfatar m.a. ein elektromekaniskan verkstað, góðkendar kølimontørar og elinnleggjara, sølu av útgerð og tænastum til alivinnuna og søla av ymiskum el-tilfari.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiðspláss í menning, og løn í mun til útbúgving og royndir.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Róa Vang (rv@ej.fo) á telefon 314547 ella 233300

**Umsókn**
saman við upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera P/F Eyðun Jespersen, Stiðjagøta 4, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. september 2007.

TEAM85

EYÐUN JESPERSEN

Pf. Eyðun Jespersen Stiðjagøta 4 FO-100 Tórshavn